# Spenningur íbirtur




*Talvið millum Ólav Simonsen og Rana Nolsøe var sera spennandi, og hóast Ólavur hevði møguleikar at vinna, so dróg Rani longra straíð*

*savnsmynd*

**Heldur óvæntað eydnaðist tað vestmenningum at minka munandi um munin upp til oddaliðið úr Havn. Bert hálvt stig skilir nú liðini**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Kappingin í 1. deild hevur býtt seg í tveir bólkar: Havnarmenn og vestmenningar togast um gullið, meðan hini fýra liðini stríðast fyri at sleppa undan niðurflyting. Eins og dysturin um gullið, er dysturin um bronsuna somuleiðis opin og javnur. Undan dystunum í vikuskiftinum, vóru havnarmenn tvey stig fremstir. Sunnudagin hittu teir botnliðið úr Kollafirði og flest øll væntaðu stórsigur.

### Torbjørn vann á Olaf

Spurningurin var um kollfirðingar, við Hans Kristian Simonsen og Torbjørn Thomsen á odda, kundi gera nakað sum helst við flúgvandi oddaliðið.

Yvir av Hans Kristiani Simonsen sat vinmaðurin Martin Poulsen. Rættir vinmenn taka ikki skjótar javnleikir og hetta hevur heldur ikki verið eyðkenni hjá teimum báðum seinastu mongu árini. Hesaferð vann Martin.

Dysturin endaði við javnleiki. Havnarmenn eru valla nøgdir. Torbjørn Thomsen vann eitt nú við svørtum ímóti Olaf Berg. Eitt heldur óvæntað úrslit, hóast Torbjørn neyvan er samdur í hesum áhaldi!

### Eldur í vestmenningum

Sjálvsálit og góður andi valdar á liðnum hjá vestmenningum. Undan dystinum ímóti hvalvíkingum, settu teir seg fyri at fáa minst ein 3-1 sigur. Fyri at fylgja nøkunlunda so dánt við havnarmonnum, mátti teir eisini vinna stórsigur.

Eftir 3-4 tímar var støðan 3-0 til VT. Rødgaard vann eitt gott og stutt talv ímóti Haldur Suna Johansen. 20 leikir. Eisini talvið millum Carl Eli N. Samuelsen og Finnbjørn Zachariassen varð stutt, men hinvegin eisini óklárt. Finnbjørn leikti skeivt í spennandi støðu. Úrslitið mundi blíva 4-0, men Martin Brekká bardist sum ein tarvur í nærum vónleysari støðu ímóti Samson Højgaard. Í 5-6 tíma eydnaðist tað Martini at fáa javnt.

Eitt væla úrslit hjá vestmenningum, sum nú kenna seg hava eins góðan møguleika at vinna gullið sum havnarmenn.

### Rani og Steintór

Greipan á Klaksvíkini 2 avgjørdi dystin ímóti Klaksvík 1. Rani Nolsøe vann eitt sera spennandi og fløkt talv ímóti Ólavur Simonsen. Ólavur hevði møguleikar at vinna, men einki tykist at ganga honum til vildar fyri tíðina. Rani, sum eisini hevur havt andróður, yvirlivdi fleiri vandastøður og tók alt stigið í endatalvinum.

Steintór Rasmussen hevur verið álitið á Klaksvík 2. Føroyameistarin frá 1990 vann eitt drúgvt talv ímóti Terja Petersen. Terji hevði helst remismøguleikar, men teknikkurin hjá Steintóri tykist ikki at bila, hóast ikki telvað verður eins nógv sum fyrr.

"B-liðið" vann, eins og í fyrra dystinum teirra millum, 3-1. Tað hevur ikki verið nøkur succes hjá klaksvíkingum at hava tvey lið í 1. deild. Bæði liðini - sum á pappírinum eru nøkunlunda eins sterk - eru í tyngra endanum. Serliga er tað "A-liðið" sum nú er í stórum vanda.

Í 2. deild hava sandavágsmenn leiðsluna, hóast teir taptu ímóti toftamonnum í vikuskiftinum.

7. umfar verður 28. januar og tá vera dystirnir í 1. deild hesir: Klaksvík 2 - Vestmanna, Kollafjørður - Klaksvík 1 og Hvalvík - Havnin.

### Vijk aan Zee byrjað

Tvey umfør eru telvd í kendu superstórmeistarakappingini í Hollandi. Vassily Ivanchuk hevur sum tann einasti fult stigatal. Veselin Topalov vann ímóti Gata Kamsky í 1. umfari, men varð niðurspældur av Michael Adams í 2. umfari. Trettan umfør eru á skránni.




*Støðumynd eftir 19.Rb1*
*Be8! (Bg6 er lemjandi hóttanin, sum ikki kann forðast fyri) 20.Rid2 Bh4+ Og Haldur gavst, vælskiljandi 0-1*

## Talvið hesa vikuna

Haldur Suni Johansen - John Rødgaard
1. deild VT-TFS
15.01.2006

1.e4 e6 2.d4 d5 (Yndisbarnið hjá Rødgaard: Franska byrjanin) 3.Ric3 Bb4 4.Rige2 dxe4 5.a3 Be7 6.Rixe4 Rif6 7.Ri2g3 0-0 8.c3 Ribd7 9.Bd3 c5 10.dxc5 Rixe4 11.Rixe4 f5! (Rødgaard - væl vitandi um, at hann fylgir einum talvi millum Sofiu Polgar og Lajos Portish - finnur rætta leik. Hvítur skal ansa sær) 12.Rig3 Rixc5 13.Bc2 (Ivasamt. Sofia Polgar leikti Bc4, sum eisini er ein betur roynd) 13...Fxd1+ 14.Bxd1? (Best hevði verið at tikið við konginum. Vit fáa sjón fyri søgn komandi leikirnar) 14...f4 15.Rif1 (Ikki júst ein dreymastøða hjá hvítum) 15...Bd7 16.Be2 Bc6! 17.f3 Rad8 18.c4 (Ilt er at finna góðan leik. Kanska Rid2 er besta boð, men tað tapir ivaleyst eisini í longdini) 18...Rib3 19.Rb1 Støðumynd

## Úrslit og støður

1. deild
6. umfar

| | |
|---|---|
| Havnin-Kollafjørður | 2-2 |
| Martin Poulsen-Hans Kristian Simonsen | 1-0 |
| Olaf Berg-Torbjørn Thomsen | 0-1 |
| Helgi D. Ziska-Bernhard Thomsen | 1-0 |
| Andrias Ziska-Hans Petur Joensen | 0-1 |
| | |
| Vestmanna-Hvalvík | 3,5-0,5 |
| John Rødgaard-Haldur Suni Johansen | 1-0 |
| Carl Eli Nolsøe Samuelsen-Finnbjørn Zachariasen | 1-0 |
| Samson Højgaard-Martin Brekká | 0,5-0,5 |
| Jákup á Rógvi Andreasen-Gunnar Joensen | 1-0 |
| | |
| Klaksvík 2-Klaksvík 1 | 3-1 |
| Rani Nolsøe-Ólavur Simonsen | 1-0 |
| Steintór Rasmussen-Terji Petersen | 1-0 |
| Rani Baldursson-Willie Olsen | 0-1 |
| Ingolf Gaard-Tummas Martin Sólsker | 1-0 |

Støðan

| | |
|---|---|
| 1 Havnin | 17,0 |
| 2 Vestmanna | 16,5 |
| 3 Klaksvík 2 | 10,0 |
| 4 Kollafjørður | 10,0 |
| 5 Klaksvík 1 | 9,5 |
| 6 Hvalvík | 9,0 |




*Kortið sýnir teinin, sum súkklað verður eftir leygardagin*

# 15 km á fjallasúkklu

**Leygardagin kl. 13.00 skipar Tórshavnar Súkklufelag fyri kapping í fjallasúkkling - mountabike**

SÚKKLING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í TSF verður sagt, at nýggja kappingin er enn ein liður í royndunum at draga fleiri ungfólk at súkkluítróttini. Fjallasúkklurnar eru helst tað slagið av súkklum, sum eru mest vanligar millum ungdókin, og tí verður hildið, at ein kapping í hesi súkklugreinini er rættiliga uppløgd.

Júst um veturin er kanska ikki besta tíðin at kappast á súkklu. Men hóast illsligt, so ber væl til at venja, og tá eru kappingar hóast alt eisini eggjandi.

Kappingin hesaferð verður skipað millum unglingar og vaksin, og verður súkklað á teininum kring Studentaskúlan í Hovyík, soleiðis sum tað framgongur av kortinum her á síðuni. Rutan, sum súkklað verður eftir, er hálvan annan kilometur, og skal hendan koyrast 10 ferðir.